## Nýggjar bøkur frá Bókadeildini Bókadeild Føroya

Lærarafelags hevur givið út smábarnabókina Mín fyrsta bók um kroppin, barnabøkurnar Fótbóltsgalin og Gimsteinagátan, og bókina Hesturin og drongurin, ið er enn ein søga úr Narnia til størri børn

### Kroppur og rørslur

Mín fyrsta bók um kroppin er smábarnabók við fittum myndum, sum umframt at seta navn á likamslutir, eisini er um sansirnar og lærir barnið at seta orð á rørslur. Mín fyrsta bók um kroppin er væl egnað til tey smæstu, hon er 36 síður í litum og prentað á haldgott papp.

### Fótbóltur og detektivar

Fótbóltsgalin er stuttlig myndabók eftir Colin McNaughton, ið er væl egnað til tey 4-7 ára gomlu. Sum so mong onnur er Bjarni eisini fótbóltsgalin. Hægsta ynskið er at sleppa at spæla við á liðnum hjá Ludda. Uttan iva ein bók, ið nógv kenna seg aftur í. Eli Hentze týddi.

Gimsteinagátan er fyrsta bókin í eini røð av níggju bókum við teimum báðum Lassa og Maiu sum høvuðspersónum. Onkur hevur stolið gimsteinar frá gullsmiðinum Muhammed Karat. Tað er mangt, sum peikar á, at eitt av starvsfólkunum í handlinum hevur framtbrotsgerðina. Løgreglan stendur tó á berum, so nú má detektivstovan hjá Lassa og Maiu taka sær av málinum.

Tað er Martin Widmark, sum hevur skrivað, og Sámal Kristian Jacobsen hevur týtt. Hesar spennandi bøkurnar eru væl egnaðar til tey 8-10 ára gomlu. Tann næsta í røðini kemur út í juni.

Gimsteinagátan er 76 bls., innbundin og Helena Willis hevur myndprýtt.

### Enn ein søga úr Narnia

Hesturin og drongurin er triðja bókin í røðini um Narnia. Tað er C.S. Lewis, ið hevur skrivað, Pauline Baynes hevur myndprýtt, og Theodor Hansen hevur týtt.

Tveir rýmingar hittast og sameinast. Teir royna at sleppa undan einum strævnum lívi í trongum korum, men verða ístaðin miðdepul í ræðuligum bardaga. Einum bardaga, ið avger lagnu teirra og lagnu Narnia. Bókin er væl egnað til tey 11-13 ára gomlu.

**ave**

# Kavamaður undir liðuni á Nólsoyar Páll

**Tríggjar ungar gentur í Havn tóku hósdagin so mikið synd í standmyndini av Nólsoyar Pálli í Vágsbotni, at tær bygdu ein kavamynd undir liðuni á honum**

KAVAMAÐUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er ikki gerandiskostur í Miðlahúsinum í Vágsbotni, at tríggjar ungar gentur koma á gátt at vita, um tað ber til at fáa okkurt í blaðið, sum tær hava gjørt. Men soleiðis var í gjár, tá ið tær tríggjar Barbara, Miriam og Malan komu at spyrja, um tað bar til at fáa kavamannin hjá teimum í blaðið.

### Fingu tíðliga frí

Tær tríggjar ganga allar í 6.b. í Eysturskúlanum, og hósdagin høvdu tær fingið eitt sindur tíðliga frí og vistu ikki heilt, hvat tær skuldu fara at gera. Men so fekk ein teirra hugskotið at gera ein kavamann undir liðuni á Nólsoyar Pálli, og eina løtu seinni var kavamaðurin liðugur. At hann eisini slapp í blaðið, gjørdi ikki dagin hjá teimum trimum 12 ára gomlu gentunum verri.



*Tær tríggjar, ið bygdu kavamannin undir liðuni á Nólsoyar Pálli: frá vinstru Barbara Lervig, Miriam W. Egholm og Malan Rasmussen.*
*Mynd: Magnus Gunnarson*




Leiðari til roknskapar- og fíggjardeildina hjá Føroya Shell

Søkt verður eftir leiðara til roknskapar- og fíggjardeildina, sum heldur til á høvuðsskrivstovuni á Viðarnesi í Tórshavn.

Verandi roknskapar- og fíggjarleiðari okkara hevur tikið við nýggjum og størri avbjóðingum í tí føroyska vinnulívinum. Vit hava tí brúk fyri nýggjum leiðara at byrja skjótast gjørligt.

**Starvið:**
Talan er um eitt sjálvstøðugt og áhugavert starv í einum spennandi umhvørvi. Leiðarin hevur alla ábyrgdina av deildini herundir
gerð av ávegis- og ársroknskapi
rapportering til útlendska móðurfelagið
fíggjarætlanum o.t.
dagligari leiðslu og skipan av deildini
roknskaparlig umsiting og samskifti við avgreiðslurnar og egnar støðir kring landið.

Leiðarin er partur av leiðslubólkinum við beinleiðis tilvísing til stjóran.

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst cand. merc., HD í roknskapi ella onnur viðkomandi útbúgving. Dentur verður lagdur á leiðaraevni og royndir, umframt arbeiðssemi og góð evnir at samskifta. Eisini krevst hollur kunnleiki og arbeiðsroyndir innan nýtslu av kunningartøkni í roknskapar- og fíggjarviðurskiftum. Góður kunnleiki í enskum er neyðugur.

**Vit bjóða:**
Eitt fjølbroytt, spennandi og sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri persónligari menning, men samstundis eitt krevjandi starv. Vit hava góðar arbeiðsumstøður og trygg starvsviðurskifti. Góð løn í samsvar við útbúgving og royndir. Eftirlønarskipan er knýtt at starvinum.

**Umsóknir:**
Skrivligar umsóknir skulu vera innlatnar í seinasta lagi fríggjadagin 10. mars og skulu sendast til P/F Føroya Shell, Vestara Bryggja 8, Postboks 188, FO-110 Tórshavn. Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum verða svaraðir við at venda sær til stjóran Hákun Djurhuus (telefon 347410) ella roknskapar- og fíggjarleiðaran Christian Nagata (telefon 347413). Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Shell



Kundaráðgevi
til Suðuroyar Sparikassa

**Vilt tú vera við til at seta kundan í fokus? Vilt tú gerast ein týðandi leikari á einum nýskapandi liði?**

Suðuroyar Sparikassi søkir eftir kundaráðgeva til spildurnýggju deildina í miðbýnum í Havn.

HØVUÐSUPPGÁVUR
Ráðgeving av privatkundum, og kredittviðgerð. Harumframt fært tú ein týðandi leiklut í framhaldandi menningini av Suðuroyar Sparikassa.

FØRLEIKAKRØV
Peningastovnsútbúgving við hóskandi eftirútbúgving, samsvarandi útbúgving ella hægri útbúgving.

Vit vænta at tú er positiv/ur, ágrýtin og fyrikomandi og dámar fjølbroyttar uppgávur. Hevur tú hug at frætta nærri um starvið, er tú vælkomin at seta teg í samband við

**Rúna H. Johannesen, deildarleiðara, á tel 359842, fartel. 239873, runi@sparsu.fo**
ella við at støkka inn á gólvið á gongugøtuni í miðbýnum í Havn.

**Umsóknarfreistin er 13. mars 2006.**
Umsóknir skulu sendast til Suðuroyar Sparikassa, Postboks 374, 110 Tórshavn, móttakari: Rúni H. Johannesen, deildarleiðari.

Vitja eisini heimasíðu okkara www.sparsu.fo

Liðið hjá Suðuroyar Sparikassa er mannað við 19 fólkum. Vit arbeiða saman fyri at veita kundum okkara eina munadygga tænastu og at tryggja framtíðina hjá Suðuroyar Sparikassa. Vit seta kundan í fokus og leggja áherðslu á nýskapan, førleikamenning og hugna fyri okkara kundar.

SUÐUROYAR SPARIKASSI Postboks 374 · 110 Tórshavn · Telefon 359870 · Fax 359873
www.sparsu.fo · sparsu@sparsu.fo

REPROZ